

# Caroline skovlar pengarnar inn

Tað lønar seg at liggja nummar fýra á heimsstyrkilistanum yvir bestu kvinnuligu tennisleikarar í heiminum. Tað kennir Caroline Wozniacki alt til í hesum døgum. Í fjør vann hon 12 millionir í sponsonpengum, og tað talið fer í ár upp um 20 milliónir. Somuleiðis vann hon 12 milliónir í fjør í vinningarløn umframt eina ókenda milliónaupphædd bara fyri at spæla við í smærri kappingum. Men sum top-10 spæælari sleppur hon nú bara at stilla upp í tveimum smærri kappingum. Men hóast 20 milliónir ljóðar nógv í sponsorpengum, so er kortini eitt petti upp til Mariu Sharapovu, ið sum heimsins best betalti kvinnuligi ítróttaíðkari forvinnur heilar 40 milliónir í sponsorpengum. Rolex urafyritøkan hevur skrivað sáttmála við Wozniacki, men størsti sponsorurin er framvegis klædnafyritøkan Adidas.



Skip og bátar við bryggju, 1975

# Hann fekk meg at mála

**Listamaðurin Amariel Norðoy hevur mist ein góðan vin, nú Hans Jákup Glerfoss andaðist í Hirtshals sunnudagin.**

LIST
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



*Amariel Norðoy*

- Ja, saknur verður í Hans Jákup. Tað er sikkurt og vist, sigur Amariel Norðoy við Sosialin í morgun.

Boðini um deyða málarans koma ikki óvart á Amariel Norðoy, listamann, sum er staddur í Keypmannahavn. Hann visti, at Hans Jákup Glerfoss var viknaður í seinastuni.

Teir báðir vóru góðir kammirátar, og Amariel Norðoy lýsir vinmannin sum ein evnaríkan málara og teknara, og ein dugnaligan yrkjara.

Teir báðir komu nógv saman í yngri árum, áðrenn Hans Jákup Glerfoss flutti av landinum. Fyrst til Svøríkis og síðstu árini í Hirtshals. Men tað var lívið í Norðoyggjum, sum sameinti teir báðar.

- Vit komu nógv saman í Klaksvík, har hann eisini legði mær lag á at mála. So hann eigur avgjørt part av æruni fyri, at eg valdi listina sum lívsleið, sigur Amariel Norðoy.

Hann greiðir frá, at millum fremstu myndevnini hjá Hans Jákup Glerfoss var Mikladalur og Borðoyavík - bygdirnar og umhvørvið har norðuri.

- Listarliga var hann í hæddini í 70árunum, tá hann fann myndaevnini norðanfyri, og hann málaði í dimmum og døkkum gráum, svørtum og hvítum. Men tað var sum um at hann misti tráðin, ella motivið, tá hann flutti úr Klaksvík. Tó hevði hann eisini nøkur góð ár úti á Reyni í Havn, tá hann búði har saman við Marnu av Kamarinum, sigur Amariel Norðoy.

nógv ár í Klaksvík, og hann helt eisini til í Havn onkur skifti. Miðskeiðis í 1990'-unum fluttu Glerfoss og konan til Danmarkar at búgva, og tey trivust tey væl í Hirtshals. Glerfoss segði soleiðis í samrøðuni við Sosialin:

- Í Hirtshals er skjótt at ganga oman til sjógvin, oman á bakkan. Føroyar eru í sjónum, og fjøllini búgva her. Fyri mær er Hirtshals mest at líkna saman við eina føroyska bygd. Gamli parturin av Hirtshals er sum Klaksvík. Har sært tú uppilagstar sjómenn, sum standa og práta, tú sært yvir bátahylin, og fólk kenna hvønn annan, júst sum heima í Føroyum. Harafturat líkjast vesturjydar føroyingum sera nógv.

Og Hans Jacob Glerfoss dró seinasta andan í Hirtshals, og har skal hann eisini jarðast. Jarðarferðin verður úr Malta í Hirtshals mikudagin.

# Hevur sítt egna pláss í føroyskari listasøgu

**Bárður Jákupsson, listamaður, lýsir Hans Jákup Glerfoss sum ein málara, sum eigur sítt heilt egna, serliga pláss í føroyskari listasøgu**

LIST
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialur.fo*

Bárður Jákupsson greiðir frá, at Hans Jákup Glerfoss tók evni upp í listini, sum ongin annar gjørdi. Til dømis menn í arbeiði, verkstøð og arbeiði umborð á skipum og útróðrarbátum.

- Hann var ikki bara málari, men eisini ein frálíkur teknari, og hansara evni at tekna, kundu vit væl gjørt meira burturúr, heldur Bárður Jákupsson.

Eins og Amariel Norðoy metir hann, at besta tíðarskeiðið hjá Hans Jákup Glerfoss var í 70árunum, tá hann málaði í svart/hvítt/ gráum tónum.

- Tað var hansara styrki, og tá gjørdi hann síni bestu verk, sigur Bárður Jákupsson, sum metir høvuðsverk málarans vera verkið "Skip og bátar við bryggju, 1975", sum Listasavnið eigur.

Bárður Jákupsson heldur ikki, at Hans Jákup Glerfoss hevur verið undangongumaður fyri nøkrum ávísum listaskúla í Føroyum. Heldur vil hann vera við, at listamaðurin eigur sítt egna, serliga pláss í listasøguni,

- Hann fann sítt egna pláss og hevði sín egna stíl. Hetta sást millum annað aftur í, at temaið ofta var arbeiðandi fólk, og tað er rættiliga øðrvísi og sjáldsamt, heldur Bárður Jákupsson.



*Bárður Jákupsson*